## Stuðulskonsert í Kelduni

Sum liður í innsavnanini til tey neyðstøddu eftir vanlukkuna í Eysturoynni, hevur Keldan nú gjørt av at skipa fyri stuðulskonsert, har inntøkurnar fara óskerdar til hjálparарbeiðið.

Tað verða fleiri kend nøvn innan føroyska gospel-heimin, sum fara at seta sín dám á kvøldið. Magni Christiansen og Jens og Kristel Lisberg mugu helst roknast sum høvuðsnøvnini, men eisini onnur verða at hoyra. Eccelesia hava ikki verið á palli so nógv seinnu árini, men eisini tey fara at hava framførslu, eins og samkoman, Lívdin, fer at hava songframførslu.

-jm

## Country á Hálsi

Leygarkvøldið komandi verður stór country-konsert í Ítróttarhøllini á Hálsi. Tað er ÍF, sum skipar fyri konsertini, har Country-bólkurin úr Klaksvík fer at standa á palli.

Tað er so langt í frá fyrstu ferð, at teir gera um seg, og vanliga hevur verið væl vitjað, tá so er. Byrjað verður kl. 22, og so verður hildið á til klokkan fýra sunnumorgunin. Sagt verður frá fyrireikarunum, at bussar koyra til og dansinum til bygdir í Streym- og Eysturoy.

-jm

## Ein rúgva av smáum óhappum

Politiið í Havn veit at siga frá eini rúgvu av smærri ferðsluóhappum, sum stóðust av øllum kavanum og hálkuni týsdagin. Mikumorgunin vóru komin tólv óhapp á døgnrapportina frá støðum kring landið, men visti vakthavandi, at uppaftur fleiri høvdu verið, har tað ikki varð meldað til politiið. Har høvdu bilførararnir tikið sær av tí sínámillum, og skaðarnir vórðu so meldaðir beinleiðis til tryggingina.

ib

# Dólgarnir seta met

**Tíggju ferðir at afturat koma dólgarnir á pallin í Sjónleikarhúsinum í Havn. Tá hava teir so eisini sett met fyri føroyska sjónleikaframførslu**

SJÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*



– Tíggju ferðir afturat. So er liðugt. Ikki tí vit ikki tíma meira, men tað eru aðrar uppgávur, sum eisini bíða leikarunum, og nú próvtøkutíðin eisini nærkast, er avmarkað, hvussu nógv vit kunnu krevja av øllum teimum, sum onkursvegna eru við í leikinum.

Soleiðis sigur Jóanna Djurhuus, sum er PR- og framleiðslufólk til leikin um »Fólk og dólgar í Kardamummubýi«.

### Nýtt met

Tá tær tíggju sýningarnar, sum nú koma afturat, eru íroknaðar, hevur leikurin verið á palli 62 ferðir síðani frumframførsluna tann 29. oktober, og tað er eftir øllum at døma met.

Jóanna sigur, at tey eru ikki heilt vís í, hvussu ofta Havnarmyndir vóru á palli í sínari tíð, men hildið verður, at framsýningarnar tá vóru nakrar og hálvtrýss í tali. Barnaleikurin, Pippi, varð fyri góðum trimum árum síðani leiktur 53 ferðir.

Og sambært Jóannu, so høvdu tey onga hóming av, leikurin fór at gerast somikið væl umtóktur, tá farið varð undir fyrstu sýningarnar.

– Sjálvandi vónaðu vit, at fólk tóku væl undir við leikinum, men ein slíka undirtøku, sum vit hava upplivað hesar mánaðirnar, høvdu vit so als ikki væntað. Vit eru snøgt sagt púrasta ovfarin, staðfestir Jóanna.

Stóri áhugin fyri leikinum gevur eisini tann upplagda spurningin, hvørt tað ikki kundi verið eitt gott hugskot, um leikurin varð festur á band, so Sjónvarpið møguliga kundi sent hann.

Til hetta sigur Jóanna, at allir leikir verða bandaðir.

– Tað gera vit altíð, so vit kunnu eftirmeta avrikið, men um tað so eisini verður til sjónvarpsupptøkur er so ikki nakað, sum eg geri av, sigur hon.

Tær tíggju eykasýningarnar av dólgunum verða í døgunum frá 25. januar til 5. februar. Forsølan byrjar nú fríggjamorgunin komandi, og verður tað hesaferð bert í Kunningarstovuni í Havn, at atgongumerki verða seld.

# Íslendskur ráðharri í javnstøðumálum vitjar

VITJAN
*tíðindaskriv*



*Árni Magnússon (39 ár) hevur sitið sum ráðharri í Javnstøðumálum síðani mai mánaði 2003 fyri Framsóknarflokkin*

Mikudagin 19. januar kemur íslendski ráðharrin í javnstøðumálum, Árni Magnusson, á vitjan í Føroyum. Tað er Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, sum hevur boðið Árna Magnussyni henda vegin. Høvuðsendamálið við vitjanini er at kunna politikarar um, hvussu almennu myndugleikarnir í Íslandi arbeiða fyri at fremja javnstøðu millum konufólk og mannfólk.

Tinglimir, landsstýrismenn og Javnstøðunevndini fáa høvi at hoyra Árna Magnusson greiða frá, hvat íslendskir myndugleikar gera fyri at fremja javnstøðu. Eftir hesa frágreiðing verður tíðindafundur, har fjølmiðlarnir fáa høvi at hitta íslendska ráðharran.

Umframt at kunna um javnstøðu skal Árni Magnusson hava fund við Hans Paula Strøm um møguleikar fyri samstarvi um almannamál, bústaðarmál og javnstøðumál. Eisini vitjar Árni Magnusson í Tinganesi, í Norðurlandahúsinum, umframt at farið verður til Kirkjubøar.

Lesið Sosialin - so eru tit við